# Summar og sól á Gøtusandi

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av landnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 18 og 21 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið møguliga ælingur. Hitin millum 16 og 19 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 16 og 19 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Fleyr til gul av norði og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 17 stig.

Tað hevur ikki verið lukkuligt, sum veðrið hevur verið gott í hesi vikuni. Hoyterrin hevur verið so mikið góður, at ongum nýtist at bera veðrinum skyldina, um tey ikki hava fingið hoyggið turt og undir tak. Tað var ikki gamalt at hoyggja og bera inn sama dag, sum tað varð sligið, men tað hevur borið til í hesi vikuni.

Avfalli hevur einki verið av. Nú eru vatngoymslurnar hjá í hvussu so er størru kommununum so mikið stórar, at tað verður ikki vatntrot soleiðis beinanvegin. Um tað veðrið, sum hevur verið í hesi vikuni, var fyri nøkrum árum síðani, so hevði verið stutt millum lýsingarnar í útvarpinum um at spara upp á vatnið.

Tá ið tað ræður um baðistrendur er synd at siga, at Føroyar standa í fremstu røð. Føroyingar leita sær ofta til Danmarkar og suður í Miðalhavið, tá ið teir vilja vera vísir í, at fáa møguleikan at slikka sól niðri við sjóvarmálan.

Men tað kemur onkra ferðina fyri, at tað er sum á Mallorca í Føroyum. Tað hevur tað verið í hesi vikuni. Henda myndin varð tikin á sandinum í Syðrugøtu mikudagin. Har var pisufundur síðst í juni, G! Festivalur stutt fyri Ólavsøku, og í hesi vikuni hevur Gøtusandur verið spæliplláss og hvíldarpláss hjá stórum og smáum. Tað hevur verið sum í Miðalhavinum.



*Á Gøtusandi var tað sum á Mallorca í góðveðrinum mikudagin*
*Mynd: Símun J. Hansen*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 10 |
| Nuuk | 11 |
| Qaqortoq | 13 |
| Ammassalik | 12 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 24 |
| Seyðisfjørður | 17 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 17 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 24 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 25 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | – |
| Keypmannah. | 22 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 17 |
| Berlin | 27 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 32 |
| Athen | 30 |
| Malta | 32 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | – |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | – |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | 18 |
| New York | 26 |
| Miami | – |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | – |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 17 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 998 hPa. sunnan fyri Írland fer í landnyrðing eystan. Eitt hátrýst, 1025 hPa. yvir Norska Havinum viknar.




Lágtrýstið eystan fyri Ongland fer eystureftir. Ein veikur hátrýstryggur yvir Íslandi til Føroya stendur mestsum í stað.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/08 kl. 06[00]–12/08 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 13,4°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° - Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: <0,1 mm – mált frá 11/08 kl. 06[00]–12/08 kl. 06[00]
Avfallið higartil í august: 15,0 mm


GEVIÐ BLÓÐ

Klaksvíkar Sjúkrahús tlf. 455463
Landssjúkrahúsið tlf. 311397
Suðuroyar Sjúkrahús tlf. 371133
www.gevidblod.fo

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


## VESTFALLSKYRRINDI

7. aug.: Seinna kvarter
11. aug.: Mánin longst frá jørðini
16. aug.: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13. aug | 05.45 | 18.09 | 04.45 | 17.09 | 05.00 | 17.24 | 07.45 | 20.09 | 08.45 | 21.09 | 04.00 | 16.24 | 03.00 | 15.24 | 06.00 | 18.24 | 07.00 | 19.24 | 05.30 | 17.54 | 06.45 | 19.09 |
| 14. aug | 06.31 | 18.53 | 05.31 | 17.53 | 05.46 | 18.08 | 08.31 | 20.53 | 09.31 | 21.53 | 04.46 | 17.08 | 03.46 | 16.08 | 06.46 | 19.08 | 07.46 | 20.08 | 06.16 | 18.38 | 07.31 | 19.53 |
| 15. aug | 07.14 | 19.36 | 06.14 | 18.36 | 06.29 | 18.51 | 09.14 | 21.36 | 10.14 | 22.36 | 05.29 | 17.51 | 04.29 | 16.51 | 07.29 | 19.51 | 08.29 | 20.51 | 06.59 | 19.21 | 08.14 | 20.36 |
| 16. aug | 07.57 | 20.17 | 06.57 | 19.17 | 07.12 | 19.32 | 09.57 | 22.17 | 10.57 | 23.17 | 06.12 | 18.32 | 05.12 | 17.32 | 08.12 | 20.32 | 09.12 | 21.32 | 07.42 | 20.02 | 08.57 | 21.17 |

5 707265 100050 >